# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 30. oktober 2009

# Stóra uppgerðin í Vágum



Kvinnurnar hjá SÍ skulu royna seg í granna- og oddauppgerð ímóti Drátti, meðan Mjølnir skal til Trongisvágs at spæla ímóti TB
Mynd: Álvur Haraldsen

**Hjá kvinnunum verður áhugavert at síggja slagið um Vágarnar, tá Dráttur og SÍ møtast**



Hilmar Jan Hansen

Á pappírinum er lítil ivi um, at mest áhugaverdi dysturin í flogbóltskappingini um vikuskiftið er kvinnudysturin á Giljanesi sunnudagin, har Dráttur tekur ímóti SÍ. Hetta er bæði eitt slag um Vágarnar, men eisini ein oddauppgerð, tí hetta eru tey bæði fremstu liðini í Eikliguni hjá kvinnum.

Fleyr, sum er á triðjaplássið, spælir ikki um vikuskiftið, men í hinum báðum kvinnudystunum er talan um ikki ólíkar fortreytir. Í Trongisvági skulu bæði TB og Mjølnir reisa seg eftir tap fyri viku síðani, og í Kollafirði er talan um reina botnuppgerð millum KÍF og ÍF, sum bæði eru stigaleys í botninum.

Hjá monnunum skal nýggja oddaliðið, Mjølnir, royna seg á útivølli ímóti Fleyr. Bæði hava tey spælt fimm settarar ímóti SÍ, men við hvør sínum úrsliti. Skal Fleyr bjóða av, so er tað helst nú, at Mjølnir skal takast.

Í honum mansdystinum er talan um tvey lið, ið skulu vaska tap av sær frá síðsta umfari. SÍ fyri at hanga við í oddanum, meðan greipuvinnararnir úr ÍF skulu royna at fáa gongd á, eftir at byrjanin hevur verið serstakliga vánalig.

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 2 | 2 | - | 0 | 6 | 0 | 6 | 4 |
| 2 Dráttur | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 4 |
| 3 Fleyr | 3 | 2 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 4 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 5 TB | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 6 KÍF | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 7 ÍF | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 3 | 3 | - | 0 | 9 | 4 | 5 | 6 |
| 2 Mjølnir | 3 | 2 | - | 1 | 8 | 4 | 4 | 4 |
| 3 Fleyr | 3 | 1 | - | 2 | 6 | 6 | 0 | 2 |
| 4 ÍF | 3 | 0 | - | 3 | 0 | 9 | -9 | 0 |



Pál Joensen sleppur møguliga at venja saman við fýra heimsmeistarum í Potsdam í Týsklandi fyrst í januar mánaði
Savnsmynd: Alexander Djorovic

# Pál millum meistarar

**Ungi vágbingurin er upp á tal sum ein av luttakarunum á svimjivenjing fyri úrmælingar, teirra millum fýra heimsmeistarar**



Hilmar Jan Hansen

Svimjisambandið boðaði í gjár frá, at Pál Joensen á kanadisku heimasíðuni SwimNews verður settur í samband við heimselituna, nú nøvn verða sett á tey, sum skulu venja saman á »Battle Camp« í Potsdam í Týsklandi.

Henda venjingarlegan verðuri tvær vikur, frá 4. til 17. januar, og har skal Pál royna seg saman við so kendum svimjinøvnum sum Yury Prilukov, Paul Biedermann, Thomas Lurz og Angela Maurer, ið øll eru heimsmeistarar.

Somuleiðis váttar Svimjisambandið, at samband er við venjaran hjá týska svimjisambandinum, Dirk Lange, um at fáa Pál við til hesa venjingarleguna, ið má sigast at vera fyri sannar úrmælingar. – Endalig avtala er ikki gjørd enn, men umtalan á SwimNews man merkja, at Pál er væl á veg inn í hópin, sigur Svimjisambandið.

Umframt teir fýra nevndu heimsmeistararnar, verða eisini OL-silvurvinnarin, Nikita Lobintsev, og tveir suðurafrikanskir langteinarar í menning, Chat Ho og Riaan Schoeman, settir í samband við »Battle Camp« í Potsdam.

# Fult hondbóltsumfar

**Bæði í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini er fult umfar um vikuskiftið. Serliga er spenningur um oddadystin hjá monnunum millum Neistan og H71**

Í hondbóltskappingini man dysturin á Hálsi í Havn millum Neistan og H71 vera tann, ið er mest áhugaverdur. Her er talan um eina uppgerð millum oddaliðið og meistaraliðið, sum í løtuni er nummar tvey, so her stendur sjálvandi nógv upp á spæl.

Dysturin fer óivað at geva eina ábending um, hvussu stór styrkin hjá Neistanum er, og hinvegin sleppur H71 eisini at vísa, um liðið megnar at koyra á og verja sítt meistaraheiti.

Eisini er dysturin á Skála eitt slag av toppdysti, tí bæði StÍF og Kyndil eru jøvn við H71 og liggja tvey stig aftan fyri Neistan. Og í triðja dystinum, sum er millum VÍF og KÍF, fæst at síggja, um kollfirðingar enn eina ferð skulu býta frá sær ella um vestmenningar toga seg nærri hinum liðunum.

Í Sunset-kappingini hjá kvinnunum verður nú upp til Neistan at vísa, at liðið er ført fyri at fylgja Tjaldri og Stjørnuni, tá Neistin tekur ímóti VB, ið tó sær út til at vera nógv viknað.

Ímóti VÍF í Vestmanna skal Stjørnan aftur koma á kósina eftir tapið í oddabrakinum í Runavík mikukvøldið. Og so verður eisini grannauppgerð á Skálafjørðinum, tá oddaliðið Tjaldur vitjar StÍF á Skála.

hil

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Tjaldur | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 136 | 95 | 41 | 8 |
| 2 Stjørnan | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 123 | 86 | 37 | 6 |
| 3 Neistin | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 109 | 92 | 17 | 6 |
| 4 VÍF | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 91 | 124 | -33 | 2 |
| 5 VB | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 58 | 83 | -25 | 0 |
| 6 StÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 60 | 97 | -37 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 161 | 139 | 22 | 8 |
| 2 H71 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 127 | 117 | 10 | 6 |
| 3 StÍF | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 142 | 138 | 4 | 6 |
| 4 Kyndil | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 134 | 136 | -2 | 6 |
| 5 VÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 144 | 138 | 6 | 4 |
| 6 KÍF | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 109 | 149 | -40 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 01/11 | 14.30 | StÍF-Tjaldur |
| 01/11 | 14.30 | VÍF-Stjørnan |
| 01/11 | 14.30 | Neistin-VB |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 01/11 | 16.00 | StÍF-Kyndil |
| 01/11 | 16.00 | VÍF-KÍF |
| 01/11 | 16.00 | Neistin-H71 |

**Eikligan, kvinnur:**

| | | |
|---|---|---|
| 31/10 | 15.00 | TB-Mjølnir |
| 01/11 | 14.00 | Dráttur-SÍ |
| 01/11 | 15.00 | KÍF-ÍF |

**Eikligan, menn:**

| | | |
|---|---|---|
| 31/10 | 15.00 | SÍ-ÍF |
| 01/11 | 16.00 | Fleyr-Mjølnir |